# Sterkur klassikari

**Tað er djarvt av Tjóðpallinum at satsa upp á ein so krevjandi klassikara, sum Nátterherbergið eftir Maxim Gorki er. Men satsið eydnast og her býðst føroyska áskoðaranum eitt høvi at uppliva eitt meginverk í dramatisku heimsbókmentunum í eini livandi og viðkomandi føroyskari útgávu.**

UMMÆLI
*Mikkjal Helmsdal*

Uppsetingin hjá Tjóðpalli Føroya av Náttarherberginum eftir Maxim Gorkij (1868-1936) er ein sterk lýsing av menniskjalagnum, og hon er trúgv ímóti frásagnarháttinum í upprunatekstinum. Leikurin, ið varð skrivaður og settur upp fyrstu ferð í Moskva í 1902, er ein varði í dramatisku heimsbókmentunum og ein av høvuðstekstunum í naturalismuni innan sjónleikin, ið hevði sum stevnu at lýsa tann samfelagsliga veruleikan so neyvt sum gjørligt á palli og strembaði eftir at endurgeva persónar og umhvørvi so veruliga, sum til ber. Og í uppsetingini hjá Kristinu S. Hansen eru tað eisini persónar av kjøti og blóði við sterkum kenslum og litríkum persónsserkennum, ið vit møta. Men hóast trúskapin móti naturalistiska upprunanum kenst uppsetingin bæði moderna og livandi.

## Samfelagsins taparar

Náttarherbergið snýr seg um tey fátækastu og mest útstoyttu í russiska samfelagnum um næst seinasta aldarskiftið. Vit eru í kjallaranum í herberginum hjá Mikail Kostylev, har samfelagsins taparar eru stúgvaðir saman. Tjóvurin Pepel fríggjar við konu Kostylev, Vasilisu, men hevur nú vent áhuga sínum móti yngru systir hennara Natasju. Har búgva eisini ein harðrendur lásasmiður Klestsj og deyðsjúka kona hansara Anna, ein miseydnaður sjónleikari, ið er vorðin drykkjumaður, ein falleraður barónur, sølukonan Kvasnja, ið selur mat á torginum, ein kortspælari, ið nevnist Satin, og Nastja, ein skøkja, sum droymir inniliga um romantiskan kærleika. Hesi fáa av og á vitjan av Bubnov, einum druknum harmonikuspælandi kasjett makara, og Abram, polititistur og farbróðir vertskonuna Vasilisu. Inn í hendan heimin trýnur pílagrímurin Luka, ein gamal og mildur fjakkari (sera hegnisliga spældur av Biritu Mohr), og ber vesaliga hópinum eitt sindur av troyst og vón. Hann uggar doyggjandi konu Klestj við lyftum um frið eftir deyðan, hann sigur sjónleikaranum frá einum viðgerðarheimi, har alkoholikarar kunnu verða grøddir uttan kostnað. Samstundis sum Vasilisa er vreið um, at Pepel forsmáar hana fyri yngru systrina, roynir hon at yvirtala hann at drepa mann sín, men Luka yvirtalar hann at lata vera og eggjar honum til at rýma við Natasju í staðin. Men áðrenn tað kemur so langt, hevnir Vasilisa seg inn á systir sína, og tað kemur til ein bardaga millum Pepel og Kostylev, sum endar vanlukkuliga. Hin gamli Luka rýmir, og hini sita eftir og tosa um hann og tað, ið hann hevur havt at týða fyri tey, meðan tey spæla kort og drekka. Sjónleikarin situr ólukkuligur fyri seg sjálvan, tí Luka gav honum ongantíð adressuna til viðgerðarheimið. Ein óvæntað og dramatisk hending endar leikin; hon skal ikki verða avdúkað her, men lakoniska endareplikkin, ið er løgd í munnin á kortspælaranum Satin, verður seint gloymd.



*Lásasmiðurin Klestsj fær verður sannførandi spældur av Hjálmari Dam*

*Mynd: Martin Sirkovsky*

## Eingin høvuðspersónur

Leikurin hevur ikki eina fasta og linjurætta hendingagongd ella nakran ávísan høvuðspersón. Her er tað ein hópur av menniskjum, ið verður lýstur, men samstundis megnar Gorki meistarliga at fáa teir einstøku persónarnar at líkjast burtur úr við teirra lyndum, lagnum og serkennum.

## Enn viðkomandi

Onkur vil helst spyrja, um ein leikur um taparar, neyð og elendigheit í russiska samfelagnum í 1902 hevur nakað at siga okkum í Føroyum í 2007. Svarið er ja. Tí hetta er ikki sosial pornografi, har neyðin verður útstillað fyri at vit skulu útliva okkara samkenslu við teimum, sum eru verri fyri enn vit, ella okkara ótta og vanvirðing fyri tí lívi, ið tey liva. Gorki var ein frálíkur lýsari av menniskjum og umhvørvum, sum av egnum lívsroyndum skrivaði um lívið á botninum í samf elagnum. Hann skrivaði ikki um tey útstoyttu sum ein eygleiðari, men úr teirra sjónarhorni. Tí lyftir leikurin seg upp um tað umhvørvið, ið hann lýsir, og gerst ein mynd av menniskjanum, sum er kroyst harút, har tað hómar avgrundina beint undir sær. Vit standa yvir av spurninginum – hvat er tað at vera menniskja, tá verðsligar ognir og samfelagslig tign og samleiki eru skrædlaði uttanav? Hvørji eru okkara val, tá tilveran onga eyðsýnda leið bjóðar okkum? Hetta eksistentiella lagið í tekstinum ber so væl og viðkomandi ígjøgnum, at tað kenst sum teksturin kundi verið skrivaður í gjár.

## Veruleikakent umhvørvi

Men úr einum væl skrivaðum teksti spyrst ikki ein góður sjónleikur uttan eina uppseting, ið megnar at forloysa dramaið og tær persónligu søgurnar. Og tað megnar uppsetingin hjá Kristinu Hansen til lítar. Hon hevur valt at vera trúgv móti tí naturalistiska stílinum, sum leikritið er skrivað í. Umhvørvið er veruleikakent; búnar og leiktjøld endurspegla tann søguliga veruleikan, sum leikurin fer fram í. (Og pallmyndin er ikki gjørd úr pappmasjé og máling – nei, ovnurin í persónarnir hita seg við, er múraður upp við múrsteinum, tann parturin av pallinum, sum í leikinum er uttandura, er lagdur við veruligum brúgvasteinum, og tann nærlagdi áskoðarin ber eisini eyga við grasstrá í rivunum her og har.). Dentur er lagdur á at spæla leiklutirnar á ein hátt, so vit trúgva upp á teir sum menniskju og trúgva teirra tankum og kenslum, uttan at leikararnir harvið enda í einari kenslubornari ella innisælari sálarfrøðiligari realismu. Her verða kenslurnar spældar út heldur enn livaðar út – og tað er gott, hitt seinna hevði verið ov strævið hjá bæði leikarum og áskoðarum. Og pláss er eisini givið fyri humori og skemti.



*Barbara Christophersen í leiklutinum, sum skøkjan Nastja, er eitt stórt talent*

*Mynd: Martin Sirkovsky*